## DAGSINS MEINING

## Sambandið til Skopunar

Sandoyggin er á mangan hátt illa fyri, tá vit hugsa um samskifti við meginøkið. Hóast nýtt skip og nógv styttri farleið til meginøkið, so er sambandið ikki nøktandi. Her eru heilt einfalt ov fáir túrar. Løgtingið hevur viðurkent hetta og hevur viðseinastu fíggjarlóg játtað pening til ein eykatúr um dagin millum Skopun og Gomlu Rætt. Hetta var sera skilagott av løgtinginum, og tí ræður um, at játtaða upphæddin kemur fólki og vinnulívi Sandoy til góðar.

Tað kann tí ikki góðtakast, at Strandferðslan nýtir hesa upphæddina av handahógv, møguliga út frá tí sum er lættast fyri stovnin. Endamálið við øktu játtanini er at veita fólki og vinnulívi í oynni eina økta og betri tænastu. Tað er eingin ivi um, at fólkið, ella brúkarin á Sandoynni ynskir játtanina til ein eykatúr millum Gomlurætt og Skopun seint um kvøldið. Tingmaðurin Gerhard Lognberg hevur reist málið og hevur í hesum sambandi verið rættiliga kritiskur mótvegis Strandferðsluni.

Gerhard hevur grein í sínum máli! Taðmá vera ein sjálvsagdur rættur hjá einum tingmanni at tala at, tá hann er sannførdur um, at ein almennur stovnur ikki ber seg at á ein hátt, sum gagnar einum øki og fólkinum í hesum øki best. Gerhard er í sínum fulla rætti at tala at, og avvarandi landsstýrismaður eigur alt fyri eitt at taka málið upp viðStrandferðsluna. Tað ræður um at fáa greiði á, hvat ið veruliga var løgtingsins vilji við játtanini. Hesin vilji skal útinnast til punkt og prikk og eink annað kann góðtakast. Vónandi finna partarnir eina loysn, um sandoyingar fáa gleði og gagn av.

**Sosialurin**

# Fiskimannaskatturin

### Viðmerking til Óla Jacobsen



**Bjarni Olsen**

Óli Jacobsen hevur gjørt vart við, at hann er ósamdur við nakrar av niðurstøðunum, sum Búskaparráðið hevur um fiskimannaskattin. Sum eg skilji tað, snýr tað seg fyrst og fremst um hesar orðingar hjá Búskaparráðnum:

- Yvir tíð vil fiskimannaskatturin gera, at lønin í fiskiskapi áðrenn skatt verður lægri, enn hon annars hevði verið. Ónatúrliga stóra útboðið av arbeiðsmegi í fiskiskapi vil sostatt gera, at arbeiðsgevararnir í fiskivinnuni sleppa bíligari og tí umbiðja meira arbeiðsmegi, enn teir annars høvdu gjørt.

Óli vísir á, at hýrurnar hjá fiskimonnum verða roknaðar sum ein partur av veiðivirðinum uttan mun til, hvør skatturin er. Tískil ávirkar tað ikki hýrurnar hjá fiskimonnum, at tann inntøkuskattur, sum teir gjalda, er lægri enn skatturin, onnur gjalda. Av tí at hýrurnar sostatt ikki ávirkast av skattinum, sum fiskimenn lata, so verður eftirspurningurin hjá reiðaríunum eftir arbeiðsmegi hvørki størri ella minni fyri tað um skatturin av fiskimannahýrum er minni enn av øðrum inntøkum.

Eg skilji væl atfinningina hjá Óla, men eg kundi hugsað mær hoyrt, hvat Óli heldur um niðanfyristandandi argumentatión.

Ein arbeiðsmaður á landi sum forvinnur t.d. kr. 180.000 árliga hevur uml. kr. 120.000 eftir, tá skatturin er drigin frá (skatturin kann vera ymiskur alt eftir umstøðurnar, men tað ávirkar ikki argumentatiónina stórvegis). Hevði arbeiðsmaðurin kunnað fingið annað arbeiði, har hann forvann t.d. kr. 170.000, og kortini havt meira eftir, tá skatturin var goldin, so rokni eg við, at tey flestu eru samd við mær í, at hann heldur hevði valt tað arbeiðið.

Hýran hjá einum fiskimanni kann fara heilt niður á kr. 156.000 fyrr enn hýran eftir skatt verður minni enn kr. 120.000. Ein bátur, sum ikki hevur nóg gott inntøkugrundarlag til at geva eina hýru, sum kann kappast við arbeiðsmannalønirnar á landi, kann sostatt ofta kortini fáa manning, tí roknað eftir skatt verður helst meira eftir til manningina við bátinum enn til arbeiðsmannin.

Nú skal eg ikki úttala meg um, hvørt hetta er rætt ella rímuligt, men bert staðfesta, at um fiskimannaskattaskipanin ikki var til, so var truplari hjá bátum, ið ikki megna at geva nóg stóra hýru, at fingið manning. Var skipanin tikin burtur, so vóru helst bátar, sum vórðu lagdir. Gott ella ringt? Ringt fyri reiðarí og manning, men kanska gott fyri tillagingarevnini í vinnuni (lykilini til framtíðina…)?

Mín niðurstøða er sostatt, at fiskimannaskatturin er við til at varðveita/fasthalda okkara flota- og vinnumynstur, ið annars helst eigur at tillaga seg, so hvørt umstøðurnar broytast. Sigast kann ikki, at reiðararnir yvir ein kamb fáa fíggjarligan vinning burtur úr fiskimannaskattinum. Bert reiðararnir av teimum bátum, sum hóra undan vegna fiskimannaskattin, mugu haldast at fáa fíggjarligan ágóða av at kunnu vera verandi í vinnuni.

Óli sigur, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi ikki økist av fiskimannaskattinum, heldur sum frá líður. Hann prógvar tað við at vísa á, at hýruparturin heldur er øktur enn minkaður tey árini, fiskimannaskattaskipanin hevur verið í gildi. Um henda gongdin heldur fram, so má sigast at vera talan um gott fakfelagsarbeiði, tí tað er náttúrligt at vænta, at fiskimannaskattaskipanin ger, at trýstið frá fiskimonnum á reiðararnar at hækka hýrupartin verður minni. Um hýruparturin kortini verður hildin uppi, so hevur Óli í fyrstu atløgu rætt í, at eftirspuningurin eftir arbeiðsmegi í flotanum ikki økist vegna fiskimannaskattaskipanini. Hinvegin, so høvdu (sum eg nevni omanfyri) onkrir bátar helst verið lagdir, um ikki vit høvdu fiskimannaskattaskipanina. Um tað er rætt, so er fiskimannaskattaskipanin við til at økja um eftirspurningin eftir arbeiðsmegi í fiskivinnuni, og harvið er hon eisini við til at "taka arbeiðsmegi" frá øðrum vinnum og til at økja um lønartrýstið í øðrum vinnum. Hartil kemur, at eg ivist lítið í, at fiskimannaskattaskipanin hevur við sær, at trýstið á at hækka lønir á landi verður størri, tí arbeiðsmegin á landi sjálvandi samanber seg við aðrar bólkar, herundir fiskimannahýrur (eftir skatt!).

Vælferðin í samfelagnum er tíverri avmarkað av framleiðsluni í samfelagnum. Samlaða framleiðslan í samfelagnum verður størst, um inntøkubýtið millum starvsbólkarnar í samfelagnum fyrst og fremst verður avgjørt av inntjeningsevnunum í einstøku vinnunum – og ikki av skattligum munum millum vinnurnar.

Kjak um eitt nú fiskimannaskattin verður ofta fatað sum eitt álop á fiskimenn. Tað er harmiligt, tí tað er neyðugt við búskaparligum kjaki, ikki minst tá tað snýr seg um okkara høvuðsvinnu. Vónandi kann omanfyristandandi nýtast sum ískoyti til eitt slíkt kjak.

# Aftursvar til Rodmund Nielsen



**Poul Mohr**

**Rodmundur hatta í Sosialinum tann 10/6-04 kann ikki standa ósvarað**

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavík: tað er ikki hvør sum helstsigur seg ikki verða í iva um, at tað er stórkapitalurin í Havn og kommunan, sum hava verið í ráðagerð um at fáa Fish Fair til Havnar úr Runavík

Eg kann lata Rodmund vita at eg – tí tað er ivaleyst meg hann meinar við er stórkapitalurin – ongantíð havi tosað við ella havt samband av nøkrum slag við menninar aftanfyri Fish Fair, kenni teir bert av myndum í bløðum – fyrr enn teir komu og spurdu um at leiga høllina á Sandvíkahjalla.

Tórshavnar Kommunu havi eg heldur ongantíð tosað við um Fish Fair.

Har hevur tú skotið langt við síðuna av.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Arne Treholt – dømdur ósekur?

**Í 1985 varð norski diplomaturin Arne Treholt dømdur tjúgu ára fongsul fyri njósning. Hann sat bara sjey ár, men í einari nýggjari bók heldur hann uppá, at hann var ósekur**

NJÓSNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Alt Noreg var skelkað, tá ákæruvaldið avdúkaði, at tað hevði tikið diplomatin Arna Treholt og skuldsett hann fyri at hava njósnast fyri Sovjetsamveldið í fleiri ár. Í 1985 kom hann fyri rættin í Oslo, og har fekk hann ta harðastu revsingina, sum norsk lóg hevur. Hann skuldi sita tjúgu ár í fongsli. Sjey ár seinni, í 1992, fekk hann kortini grið og varð latin leysur. Komin úr fongslinum varnaðist hann skjótt, at hann var alt annað enn ein avhildin maður, og hann valdi tí at flyta av landinum. Tey tólv árini síðani hevur hann búð á miðjarðarhavsoynni Kýpros.

### Kundi gagna Noregi

Nú hevur hann skrivað eina bók um lív sítt. Hann heldur uppá, at hann var ongantíð njósnari, og at hann bleiv dømdur, sjálvt um hann var ósekur. Kortini dugir hann at skilja, at norsku myndugleikarnir hildu eygað við sær, tá hann á ferðum uttanlands hitti umboð fyri sovjetsku fregnartænastuna KGB. Sjálvur sigur hann, at kanska hevði hann hug at virka sum "ein privatur uttanríkisráðharri", og at kanska leið hann eisini av hásinni.

– Eg var við í einum spennandi arbeiði í sjeytiárunum. Tá snúði tað seg um viðurskiftini ímillum eystur og vestur, um kjarnorkuvápn og um trygdarpolitikk. Í 1979 varð eg sendur til New York at arbeiða á norsku sendistovuni í ST, men hetta arbeiðið var ikki júst tað, sum mær dámdi best. Tá so Gennadij Titov setti seg í samband við meg, kundi eg ikki standa ímóti freistingini, og tí tók eg av, sigur Arne Treholt.

Hann helt, at samstarvið við russar kundi koma Noregi til góðar. Kanska kundi hann fáa beinleiðis samband við Kreml, og soleiðis sum støðan var ímillum Noreg og Sovjetsamveldið tá, kundi tað vera hent hjá Noregi at hava samband við ta ovastu sovjetsku leiðsluna.

### Ikki ólógligt

– Í dag dugi eg at síggja, at eg skuldi ongantíð verið farin inn á hasa kósina. Eg veit, at tað, sum eg gjørdi, var skeivt, men harvið er ikki sagt, at tað var ólógligt ella revsivert. Sjálvur helt eg meg hava eina ávísa trygd, tí eg hevði ikki atgongd til nøkur loynilig



*Arne Treholt*

skjøl tá, sigur Treholt.

Hann leggur afturat, at hann vildi fegin, at onkur hevði lagt uppí. Spurdur, hvør tað skuldi verið, svarar hann, at tað kundi verið onkur av teimum fremstu politikarunum. Sjálvur var hann ungur tá og hevði eina trongd eftir at gera okkurt munagott. Slíkt er vandamikið, tí tað kann fáa ein at leypa framav, og tað var tað, sum hendi hjá mær, sigur Arne Treholt.

Í bókini greiðir Arne Treholt frá sambandi sínum við Gennadij Titov, men hann dugir ikki at siga, hví hann ikki greiddi nøkrum frá hesum sambandinum. Hann ásannar, at tað var skeivt at dylja tað, men hann heldur kortini ikki, at tað var ólógligt.

### Ikki njósnari

– Men sum frá leið leiddist eg av hesum fundunum í útlandinum. Eg visti longu frá byrjanini, at eg var farin inn á eina kós, sum kundi vera vandamikil, og tað var eisini orsøkin til, at eg ikki fór á ein fund við Titov í Helsingfors í februar í 1983. Um tað mundið gekk á eg háskúlanum hjá norsku verjuni og hevði atgongd til loynilig skjøl. Hevði eg farið til Helsingfors, hevði tað verið trupult hjá mær at greiða frá, hvussu eg kundi hitta ein sovjetskan umboðmann ein dag og síðani sita á skúlabonkinum á verjuháskúlanum dagin eftir. Eg fekk meg heldur ikki til at gera tað, og tí hitti eg ikki Titov aftur fyrr enn um summarið í 1983. Tá var eg liðugur á verjuháskúlanum.

Í bókini skrivar Arne Treholt, at hann lat KGB ávirka seg í tíggju ár. Tá hevði hann eina aðra uppfatan av hesum. Hann uppfataði Titov sum ein góðan og sera áhugaverdan samstarvsfelaga, og hann kendi ongantíð á sær, at hann bleiv misnýttur.

– Eg haldi framvegis ikki, at teir nýttu meg sum njósnara. Men tá eg seinni í 1983 hitti Titov og eitt annað sovjetskt umboð í Wien fekk eg varhugan av, at teir ætlaðu at brúka meg. Tað vildi eg ikki, og eg segði tað eisini við teir.

Arne Treholt visti ikki, at norska fregnartænastan var í Wien, tá hann hitti tey bæði sovjetsku umboðini. Norðmenninir hildu eygað við teimum trimum, og tá løgreglan seinni tók Arna Treholt, bleiv ein mynd av honum og teimum báðum sovjetsku umboðunum løgd fyri hann. Hann skilti, at norska fregnartænastan hevði verið í Wien, og at virksemi hansara var vorðið avdúkað.

### Fregnartænastan politiska ávirkan

Í bókini rør Arne Treholt uppundir, at fregnartænastan hjá norsku løgregluni hevur havt ein ávísan leiklut í norskum politikki. Hann nevnir millum annað, at í 1986 bleiv Gro Harlem Brundtland kunnað um, at stórtingsmaðurin Einar Førde hevði samband við Sovjetsamveldið. Tað fekk hon at vita frá fráfarandi forsætisráðharranum, Kåre Wilooch.

Sjálvur heldur hann, at fregnartænastan hjá løgregluni hevur havt munandi politiska ávirkan uttan fyri sítt veruliga virkisøki. Tænastan hevur ein hóp av upplýsingum um nógv fólk, og úr øðrum londum vita vit, at upplýsingar hjá slíkum tænastum verða nýttar á ymiskan hátt.

– Vit hava brúk fyri slíkum tænastum, men vit eiga at gera okkum greitt, at tað at halda eygað við fólki kann skjótt elva til misnýtslu, sigur maðurin, sum fekk landsins harðastu revsing fyri njósning, men sum sigur seg vera ósekan.

*(Kelda: Bergens Tidende)*

# Stórur áhugi fyri prestagarðinum

BYGDASAVN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Gamli prestagarðurin, sum Hammershaimb lat byggja í 1863, lat týsdagin upp. Tað er fornminnissavnið, sum hevur sett garðin í stand til eitt bygdasavn. Jógvan Ingvard Olsen, formaður í Bygdasavninum á Nesi, sigur, at útvið 30 fólk løgdu leiðina framvið prestagarðinum.

– Vit vistu ikki reiðiliga hvussu nógv fólk vit skuldu vænta, men vit høvdu í øllum førum ikki væntað so nógv fólk, sigur Jógvan Ingvard Olsen. – Tað var jú eitt vanligt gerandiskvøld, at vit lótu upp. Vit høvdu kanska ímynda okkum fleiri fólk at koma sunnukvøld. Tá hava fólk ofta hug at fara ein biltúr, sigur Jógvan Ingvard.

Hann sigur, at tað ikki bert vóru fólk úr Eysturoynni, sum komu at vitja, men at tey eisini komu úr øðrum oyggjum.

– Eg haldi, at fólk vóru vælnøgd, táið tey fóru avstað aftur. Eg hoydi so onga negativa viðmerking, sigur Jógvan Ingvard at enda.

Gamli prestagarðurin er opin sunnudagar frá 15-18 og týsdagar frá 16-19. Eftir 1. september verður bert gjørligt at síggja garðin eftir avtalu.



*Prestagarðurin, sum Hammershaimb lat byggja, kostaði í 1863 4072 ríkisdálar. Hetta vóru sera nógvir pengar tá, og Hammershaimb bant eisini komandi prestar uppá lánið, sum skuldi verða goldið aftur innan 28 ár. Lánið varð tikið frá jomfru Schrøder, sum var einaarvingi, og tí átti fitt av peningi.*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*